HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

[illegible]

Tórshavn, hin 18. januar 1999
Málnr.: 613-91-0009-18
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: Bryndis á Dunga

IRF
520 Leirvík

UMHVØRVISGÓÐKENNING AV
TYRVINGARPLÁSSINUM Í SANDOY

Vísandi til umsókn um endurnýggjan av umhvørvisgóðkenning av tyrvingarplássinum í Sandarhaga í Sandoy, dagfest 15. juni 1998, og við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988 og grein 1, stk. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994, um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, verður við hesum sagt frá, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan kann veita umhvørvisgóðkenning til tyrvingarplássið í Sandarhaga í Sandoy. Umhvørvisgóðkenningin verður givin við teimum treytum, ið eru lýstar undir "Góðkenningartreytir".

**Umsóknin**
Fylgjandi tilfar er móttikið:

- Felagsreglugerð fyri tyrvingarpláss hjá IRF, góðkend av Føroya Landsstýri 21. september 1989, um burturkast sum ikki kann brennast. Reglugerðin er løgd inn í góðkenningina.
- Umsókn um endurnýggjan av tyrvingarplássinum í Sandarhaga í Sandoy, dagfest 15. juni 1998
- Yvirlitstekning, sum lýsir tyrvingina og ræsleiðing frá plássinum, dagfest 7. januar 1999.

**Málsviðgerð**
Grundarlagið undir málsviðgerðini er fyrst og fremst tær upplýsingar, sum eru móttiknar í omanfyri lýsta tilfari. Umframt hetta hevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan havt eftirlit við plássinum síðan 11 september 1991, har serligur dentur er lagdur á, at raksturin og skipanin av plássinum er í tráð við galdandi reglar fyri slík pláss.

**Góðkenningartreytir**

1. **Innrætting**

1.1 Áir og lækir skulu við grøv leiðast uttan um plássið soleiðis, at einki vatn rennur inn á tyrvingarplássið.

1.2 Plássið skal verða innrættað soleiðis, at regnvatn ikki savnast á plássinum.

1.3 Alt frárensl frá økinum skal leiðast í ein savningarbrunn við oljuútskiljara og við møguleika fyri sýnistøku eftir oljuútskiljaran.

1.4 Frárensl frá plássinum má ikki vera atkomiligt fyri seyði o.ø., men skal innilokað leiðast frá plássinum og beinleiðis í resipientin niðast undir plássinum.

1.5 Tyrvingarplássið skal verða innigirt við 2 m høgum hegni og portri, sum kann læsast.

1.6 Pláss skal vera fyri eini hóskandi nøgd av tyrvingartilfari, umframt at pláss skal vera fyri, at bingjur kunnu standa á økinum

1.7 Útleiðingin frá plássinum skal halda ásett markvirði, sum fyrisett í

Debesartrø
FO-100 Tórshav
Faroe Island
Tel. +298 31 55 9
Fax +298 31 65 0

fylgiskjali nr. 1.

1.8 Flow-metur skal setast á útleiðingina eftir oljuútskiljaran.

1.9 Við tilkoyringina til tyrvingarplássið skal skelti uppsetast, sum lýsir, hvør hevur ábyrgd av plássinum, eftirlit v.m.

1.10 Tyrvingarplássið skal eftir umbøn vera atkomiligt hjá eftirlitsfólki frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni alt árið.

## 2. Tyrvingarlutir

2.1 Loyvt er at tyrva tilfar, vísandi til fylgiskjal nr. 2, pkt. 2.

2.2 Einki vandamikið dálkandi burturkast má koma á tyrvingarplássið, ella verða tyrvt har, um onnur avtala ikki er gjørd við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, vísandi til fylgiskjal til kunngerð nr. 147/95 um burturkast.

2.3 Vanligt húsarhaldsrusk og annað burturkast, sum skal brennast, má ongantíð koma á tyrvingarplássið uttan so, at serligt loyvi er givið, og tá bert í samráð við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og bert í avmarkað tíðarskeið.

2.4 Tilfar, sum kann endurnýtast og sum hevur aðrar innsavningarskipanir, so sum jarn/metal og glas o.t., mugu ikki tyrvast á plássinum aftaná mars 1999.

2.5 Asbestpláss skal nágreiniliga ávísast á yvirlitstekning fyri plássið.

## 3. Rakstur

3.1 Tá ið burturkastið er komið á plássið, skal tað tyrvast við í minsta lagi 20 cm av tyrvingartilfari skjótast gjørligt og í seinasta lagi við endanum á hvørjum degi.

3.2 Sum tyrvingartilfar kann nýtast mold, eyrur og annað líknandi tilfar; spillvatnsevja kann eisini nýtast, tó við serligum loyvi frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

3.3 Burturkast má undir ongum umstøðum finnast uttanfyri plássið, og ruskinnsavnarin hevur ábyrgd av, at ruskið verður tikið inn á plássið og beint burtur eftir galdandi reglum fyri slíkt burturkast.

3.4 Ruskinnsavnarin hevur ábyrgd av, at plássið er læst, tá ið eingin er á staðnum, og at seyður og annar fenaður ikki sleppur inn á plássið.

3.5 Tyrvingarplássið skal fyllast upp til eina ávísa hædd og altíð minst 0,5 m undir yvirflatu og avsluttast við í minsta lagi 0,5 m av mold, og gras skal sáast soleiðis, at minst møgulig broyting er í mun til upprunaliga lendið, tá ið tyrvingarplássið er niðurlagt.

3.6 Ábyrgdina av, at tyrvingarplássið verður rikið samsvart hesum reglum, hevur IRF.

## 4. Óljóð

4.1 Raksturin á staðnum má ikki bera við sær, at óljóðniveau $L_r$ fer uppum fylgjandi virði í bústaðarøkjum hjá fastbúgvandi:

| | |
|---|---|
| Mánadag - fríggjadag 07.00 - 18.00 og leygardag 07.00 - 14.00: | - 55 dB(A) |
| Aðrar tíðir: | - 45 dB(A) |

## 5. Innaneftirlit, sýnistøka og skrásetingar

5.1 IRF skal føra rakstrarbók yvir móttiknar nøgdir, og Heilsufrøðiliga Starvsstovan skal í januar mánaði í hvørjum ári hava fráboðan um móttiknar nøgdir og slag frá undanfarna ári.

5.2 Regluligt eftirlit skal vera á plássinum, tó minst 3 ferðir um árið. Eftirlitsfrásagnir í sambandi við vitjanir skulu sendast Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

5.3 IRF skal minst eina ferð um árið gera kanningar av frárensluvatninum frá plássinum, jørðsýnir o.t., sum kunnu vera dálkað. Kanningarnar skulu gerast samsvart kanningarfyriskipanum hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og kannast á einari góðkendari starvsstovu, vísandi til fylgiskjal 1, talvu 1 og 3.

5.4 Úrslit frá sýnistøkunum skulu sendast Heilsufrøðiligu Starvsstovuni í januar mánaði á hvørjum ári.

5.5 Viðkað kanningarskrá kann í serligum føri verða umbiðin av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, vísandi til fylgiskjal 1, talvu 2.

6. **Kanningar**

Sí fylgiskjal nr. 1.

**Almennar treytir**

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur eftirlit við IRF. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini. Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur til eina og hvørja tíð heimild til at kanna viðurskiftini á tyrvingarplássinum og at gera vart við møguligar skeivleikar.

Sambært grein 26 í umhvørvisverndarlógini má virkið ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið hevur ávirkan á dálkingarviðurskiftini hjá virkinum, fyrr enn víðkanin ella broytingin er góðkend.

Hendan góðkenningin er galdandi í 5 ár frá omanfyri nevndu dagfesting.

Umsókn um nýggja góðkenning skal sendast Heilsufrøðiligu Starvsstovuni í seinasta lagi ½ ár, áðrenn hendan góðkenningin gongur út.

Góðkenningin fríheldur tó ikki fyri at søkja um onnur neyðug loyvi hesum viðvíkjandi.

IRF ber allar útreiðslur til sýnistøkur og kanningar, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan letur gera í sambandi við eftirlit og tiltøk fyri at fyribyrgja dálking.

**Kæra**

Avgerðir tiknar av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni kunnu sambært grein 66 í umhvørvisverndarlógini kærast til Føroya Landsstýri. Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, avgerðin er almannakunngjørd. Kæran skal latast Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sum síðan sendir Føroya Landsstýri kæruna.

Tórshavn, hin 18. januar 1999.

Bárður Enni, Stjóri

Jacob P. Joensen

Avrit:

Sands Kommuna
Landslæknin
Føroya Landfúti
Friðingarnevndin fyri Sandoy

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Tórshavn, tann 18. januar 1999
Málnr.: 612-91-0009-19
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: Bryndis á Ónga

## Fylgiskjal 1

### Sýnistøka og markvirði fyri tyrvingarplássið í Sandarhaga

Markvirðini eru útroknað, og ásett eftir teimum útleiðingarvirðum, sum tyrvingarplássið kann halda (#), vegleiðing frá Miljøstyrelsen nr. 6/74 (¤), Fyns Amt Teknik og Miljøudvalg (*) og Dansk Amtsvandingsmarforening (DAVID) (§).

*Talva 1. Markvirði fyri útleiðing og vanligari sýnistøku av spillvatni.*

| Parametur | Markvirði fyri útleiðing mg/l |
|---|---|
| Pb (Blýggj) | 0,5 # |
| Cd (Cadmium) | 0,003 # |
| Hg (Kyksilvur) | 0,003 # |
| Fe (Jarn) | 500 * |
| pH | 6,5 - 9,0 # |
| Leiðingarevni | -- |

*-- Markvirði er ikki ásett, vanlig útleiðingarvirði fyri perkolat frá brennistøðum liggja um 1500-4000 mS/m, visandi til D.I.F. membraner til losepladser 1. udg., okt. 89, DS/466*

*Talva 2. Markvirði fyri útleiðing og víðkaðri sýnistøku av spillvatni.*

| Parameter | Markvirði fyri útleiðing mg/l |
|---|---|
| Olja (mineralsk) | 10 ¤ |
| As (Arsen) | 1,0 ¤ |
| Mo (Molybden) | 1,0 ¤ |
| Se (Selen) | 0,05 § |
| V (Vanadium) | 0,5 § |
| Trichlorethylen | -- |
| Tetrachlorethylen | -- |
| Naphtalen | -- |
| Benz(a)pyren | -- |

*-- Markvirði eru ikki ásett. Hesi evni eru øll skaðilig og skulu ikki leiðast út.*

Harumframt skulu jørðsýnir gerast á hvørjum ári niðanfyri plássið. Sýnini skulu gerast í samráð við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna.

*Talva 3. Jørðkanningar.*

| Parametur | Markvirði mg/kg |
|---|---|
| Pb (Blýggj) | 40 # |
| Cd (Cadmium) | 0,5 # |
| Hg (Kyksilvur) | 0,2 # |
| Fe (Jarn) | 42000 mg/kg ella 4,2 % # |

*Ref. litt.: "Metals and Their Compounds in the Environment". Edited by Ernst Merian. VCH 1991 og "Elements of Marine Ecology". Edited by R.V. Tait. Butterworth 1972.*

## Fylgiskjal 2

**Dagfest: 21.01.1999**

Listi yvir burturkast, sum skal beinast til ávikavist: Brenningar, tyrvingar, servigerð ella endurnýtslu. Listin er ikki tømandi. Har ivamál eru, verður víst til tí eina og hvørja tíð galdandi donsku burturkastkunngerðina

<u>1. Til brenning hjá IRF og KB:</u>
Alt vanligt húsarhaldsburturkast, herundir allar innpakningar og allar matleivdir
Alt plastikk uttan PVC-plast
Gummi, t.d. dekk (arbeiðast skal við at fáa hetta í endurnýtsluskipan)
Trol o.t., nót og bandleivdir (ansast skal eftir, at bislóðir eru tiknar úr garnum o.t.)
Sjúkraburturkast
Livrunnið burturkast, sum ikki kann endurnýtast í aðrari framleiðslu ella nýtast t.d.v. tøðing
Roykskynjarar o.t. frá húsarhaldum (batteríir skulu skiljast frá, áðrenn brent verður)

<u>2. Til tyrving á vanligum plássum:</u>
Alt vanligt óbrennibært tilfar, sum ikki er serliga dálkandi, ella ikki kann fara í endurnýtsluskipan
Asfaltleivdir
Glas, sum ikki fer við í endurnýtsluskipan, t.d. bilglas, rútaglas, sum innihalda kít.
Impregneraður (rotvarður) viður
Evja frá vegbrunnum og botnfellingarbrunnum, sum ikki eru íbundnir klosett, ella innihalda livrunnið burturkast
Oljudálkað jørð eftir nærri meting av dálkingarpotentiali
Asbestburturkast (skal ávísast á yvirlitskorti fyri plássið)

<u>3. Til tyrving á serliga góðkendum plássi:</u>
Sum lýst í pkt. 2.
Øska og flogøska frá brennistøðum
Batteríir, sum innihalda minni enn 0,025% Hg

<u>4. Til móttøku í sambandi við servigerð, t.d. avskipan til Kommunekemi</u>
Alt, sum er nevnt á lista yvir serliga dálkandi burturkast samb. kunngerð nr. 147/95, og sum ikki kann burturbeinast á annan hátt sambært hesum fylgiskjali. (Fráboðan um móttøkuna skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni).

<u>5. Til goymslu ella nýtslu sum fylla uttan góðkenning</u>
Betongleivdir
Mold
Sankurvó (t.d. livrunnið burturkast frá húsarhaldum, tá ið hetta verður sankað (komposterað))
Greinar, blað, gras o.t. frá urtagerðum og landbúnaði

<u>6. Til útleiðing í sjógv</u>
Salt og saltlaki (matur skal ikki verða íblandaður)

<u>7. Til góðkend evjupláss</u>
Evja frá rottangum og reinsiverkum

<u>8. Til góðkenda endurnýtslu</u>
Bilvrak
Jarn og metal, sum kann beinast til endurnýtslu
CFC o.t.
Spilliolja
Fløskur, sum eru umfataðar av pantskipan
Alt slag av glas (glasbrot, øll sløg av fløskum, rútaglas uttan kít, niðursjóðingarglas og luktilsglas)
Klæði (Føroya krossur)



IRF

Tyrvingar og ríðingapláss í Sandoy

Mát: 1:1000

Dagf. 7. jan. 1999    Teknað: sp